# Tvøroyrar Býráð fær fíggjarligt frælsi aftur

**KOMMUNUSKULD** Tvøroyrar Býráð hevur nú goldið skuldina hjá kommununi so mikið langt niður, at hon allarhelst skjótt verður tikin av "svartalista" hjá Fíggjarmálaráðnum

Áki Bertholdsen

Nú fer av álvara at síggja ljósari út hjá Tvøroyrar Kommunu.

Tá ið ringast stóð til, hevði hon eina skuld upp á sjey álíkningar.

Men við árslok í ár er nettoskuldin komin niður um eina álíkning.

Tað varð upplýst á býráðsfundinum, nú fíggjarætlanin varð samtykt.

Kommunan hevur framvegis eina skuld upp á 60 milliónir, men samstundis eigur hon 14 milliónir á bók.

Sostatt verður nettoskuldin 46 milliónir við árslok í ár.

Men inntøkan hjá kommununi av skatti er 47 milliónir og sostatt er nettoskuldin komin niður um eina álíkning.

Hetta er fyrstu ferð í eitt mannaminni, at Tvøroyrar Kommuna er undir einari álíkning í nettoskuld.

Skuldin hjá Tvøroyrar Kommunu er upparbeitt langt áðrenn tað varð sett í kommunulógina, at ein kommuna kann ikki skylda meiri enn eina álíkning í skatti

Tað var serliga í áttatiárunum, at kommunuskuldin á Tvøroyri tók ferð upp ímóti himli. Tað hendi í mestan mun í sambandi við, at kommunan brúkti nógva orku upp á at halda lív í vinnulívinum á plássinum og tá ið tað fór sama veg, sum næstan alt annað vinnulív í landinum, stóð kommunan eftir við eini risa skuld.

Men nýggi skúlin í Trongisvági bleiv eisini ein kleppur um beinini á kommununi, tí hann bleiv nógvar ferðir dýrari enn ætlað.

**»** Skúlin er í so ringum standi, at hann er ikki at bjóða børnum at ganga í

### Leggja til rættis

Í Tvøroyrar Býráð vóna tey nú, at Fíggjarmálaráðið fer at at taka fíggjarliga støðuna hjá kommununi upp heilt skjótt og taka hana av listanum yvir kommunur, sum eru so skuldartengdar, at tær ikki sleppa at seta seg fyri láni.

Men í Tvøroyrar Býráð eru tey samstundis fullgreið yvir, at hóast kommunan fær fíggjarliga frælsið aftur, verður tað ikki við tað allarfyrsta, at nakað stórvegis av pengum kunnu brúkast.

**»** Fyri ein stóran part er tað óneyðugt, at vit yvirhøvur sita her

- Tað mesta av fíggjarætlanini fer til rakstur, og soleiðis verður støðan eisini næstu tíðina, staðfestir býráðið.

Men næsta ár er so eisini ætlanin at betala átta milliónir í rentum og avdráttum.

Hinvegin staðfestu býráðslimir somuleiðis, at tað standa nógvar avbjóðingar fyri framman.

Ikki minst verður hugsað um at gera ábøtur á skúlan, sum er í so vánaligum standi, at hann er ikki "at bjóða børnum at ganga í", sum tikið varð til.

Somuleiðis krevur skúlin í Trongisvági stórar ábøtur.

Men tá ið kommunan er komin niður um eina álíkning í skuld, hevur kommunan so tað frælsi at seta seg fyri láni upp til eina álíkning og tað gevur í øllum førum kommununi aðrar møguleikar.

- Tá kunnu vit av álvara fara undir at leggja framtíðina til rættis, siga býráðslimir á Tvøroyri.

*aki@sosialurin.fo*



# Kommunur í Suðuroy stuðla langhyli í Vági

**LANGHYLUR** Allar kommunurnar í Suðuroy hava nú samtykt at stuðla ætlanini at gera langhyl í Vági. Men treytin frá Tvøroyrar Býráð er, at arbeiðið verður boðið út

Áki Bertholdsen

Ætlanin at byggja eina grøna multihøll, við 50 metra langhyli, í Vági, hevur fingið góða undirtøku í teimum sjey kommununum í Suðuroy.

**»** Tað verður ikki við allarfyrsta, at nakað stórvegis av pengum kunnu brúkast

Stigtakararnir til verkætlanina hava heitt á allar kommunurnar í Suðuroynni um at stuðla verkætlanini við 100 krónum fyri hvørt fólkið í kommununi, bæði næsta ár og í 2012.

Og nú kommunurnar hava lagt fíggjarætlanirnar fyri næsta ár, hava tær allar sjey samtykt at stuðla ætlanini við 100 krónum fyri hvørt fólki næsta ár.

Peningur er avsettur á fíggjarætlanini fyri næsta ár.

### Skal bjóðast út

Men Tvøroyrar Býráð hevði kortini eitt fyrivarni og tað er, at tey krevja, at arbeiðið at gera høllina skal bjóðast út, so at eisini fyritøkur á Tvøroyri kunnu fáa høvi til at bjóða upp á arbeiðið.

Tá ið stigtakararnir hava lagt ætlanina fram, sæst, at teir hava leitað sær vegleiðing og ráðgeving frá fleiri virkjum og fyritøkum.

**»** Arbeiðið at gera langhyl og multihøll í Vági, skal bjóðast út

Men Tvøroyrar Býráð staðfestir, at verður hetta skilt soleiðis, at hesar somu fyritøkur eisini skulu standa fyri sjálvum arbeiðnum, fer tað at endurskoða samtyktina um at stuðla verkætlanini.

- Tað er ein treyt fyri stuðlinum, at arbeiðið skal bjóðast út, sigur ein samt Tvøroyrar Býráð.

Multihøllin skal standa beint undir liðini á el verkinum í Vági og stigtakararnir hava fingið tilsøgn frá SEV um at teir skulu fáa avlopshitan frá elverkinum fyri einki og tað er nógv mikið til at hita bæði langhylin og høllina sjálva.